STARVSLÝSING

## Elektrikari

Søkt verður eftir dugnaligum og álitandi elektrikara til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um viðlíkahald og umvæling av el-útbúnaði á skervverkum og asfaltverki o.ø. hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum elektrikari ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Handverksmeistarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 18. apríl. 2006. Merkið brævbjálvan "Umsókn handverkari". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tel 540 950.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land


# Kaupthing: 200.000 krónur til Herbergið

**Á samkomu seinnapartin fríggjadagin handaði Petur Holm, stjóri í Kaupting, umboðum fyri Herbergið hjá Frelsunarherinum í Havn gávu áljóðandi 200.000 krónur**

GÁVA

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Um orsøkina til stórfingnu gávuna sigur Petur Holm, at hann gamlaárskvøld gjørdi av, at Herbergið skuldi fáa gávu, so skjótt høvi varð til tess.

Tá vísti Sjónvarpið frá Herberginum og vitjaði nakrar teirra, ið húsast har.

– Tey gera eitt stórt arbeiði. Heldur enn at stongja fólk úti, so kveikja tey vón. Tey hava uppiborið eitt herðaklapp, sigur Petur Holm, stjóri í Kaupting.

Um upphæddina, ið kann tykjast stór, sigur Petur Holm, at metingin er, at hetta skuldi vera ein gáva, ið munar.

Hann sigur, at peningurin ikki er oyramerktur sum so, men at gávan er til Herbergið.

– Júst hvussu peningurin verður nýttur skilabest, duga tey, ið har starvast, óivað mest at meta um, sigur Petur Holm.




*Toril og Niels Edvard Olsen frá Frelsunarherinum við gávukekkinum upp á 200.000 kr, sum Herbergið fekk frá Kaupthing á samkomu fríggjadagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*


www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




## Grafikari

Ert tú fyrikomandi, hevur góðan grafiskan sans og førleika. Ert tú álitandi, røkin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann vit leita eftir.

Til grafisku deild okkara sóknast vit eftir fólki, ið fyrst og fremst fær til uppgávu at gera lýsingar og annað grafiskt arbeiði, sum hoyrir blaðframleiðsluni til.

Sum aktivur partur av lýsingagerðini kemur viðkomandi at vera ein týðandi bindiliður millum lýsingardeild og framleiðsluna annars í bæði nýmótans og hugnaliga umhvørvinum í Miðlahúsinum. Eisini verður tú ein týðandi partur í tilrættisleggingini av lýsingarátøkum og temabløðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer á tlf. 341825. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 12. apríl, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
Att: Jonhard Hammer
Postsmoga 76
110 Tórshavn

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*



## Skrivstovufólk til Elding í Miðlon

**Í sambandi við at Elding er flutt í nýggj høli í Miðlon í Havn og at virksemi tí er munandi økt, søkja vit eftir skrivstovufólki at byrja skjótast tilber. Elding er førandi innan sølu av elektriskum lutum og hvítvørum. Høvuðsveitari hjá Elding er EL-Giganten, sum er størsta handilsketa av sínum slag í Norðurlondum.**

**Skrivstovufólk**
Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv í nýggjum og spennandi umhvørvi, har høvuðsuppgávurnar hjá tær vera tollavgreiðsla og annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Vit vænta at tú er ágrýtin, fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur um tú hevur útbúgving og royndir innan skrivstovuyrki og at tú áður hevur fingist við tollavgreiðslu.

Løn og treytir í samsvari við útbúgving og royndir.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá Annu Mariu, á tel 350080.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 22. apríl 2006 og skal sendast til:

**Elding,**
**Postboks 1289,**
**110 Tórshavn,**
**att: Mads A. Winther.**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

ELDING

**Elding, Miðlon, Postboks 1289, 110 Tórshavn**